Fría kriminalforsorgin 30 ár

# Ímillum umsorgan, stuðul og eftirlit

**Verði henda grein skrivað í takksemi til skiparan Martin í Søldarfirði og øll góð fólk á føroyska arbeiðsmarknaðinum á sjógvi og landi, sum seinastu 30 árini hava givið revsulógarbrótarum ein kjans at fóta sær aftur í samfelagnum**

KRIMINALFORSORGIN
*Karin Kjølbro*
*Kriminalforsorgarleiðari*



*Karin Kjølbro, kriminalforsorgarleiðari, ið hevur myndað kriminalforsorgina í 30 ár, hevur ikki 30 ára starvsdag. Hon hevur ofta verið í farloyvi vegna politiskt arbeiði.*

Tað var fyrst í 70-árunum at táverðani fúti í Føroyum harra Klerens søkti danska løgmálaráðið um, at fáa eina kriminalforsorgardeild í Føroyum. Løgmálaráðið gjørdi av at senda ein medarbeiðara til Føroyar at meta um, antin tað var tørvur fyri tí. Hetta var ein sosialráðgevi, ið m.a. hevði arbeitt í Kriminalforsorgini í Grønlandi. Hann var her í 2 ár og kom til tað niðurstøðu, at arbeiði var til eitt fólk. Starvið var lýst til setan 1. mai 1976. Undirritaða var sett í starvið - fyrstu árini einsamøll, seinni kom ein skrivari og seinastu 10 árini hevur harumframt verið ein fulltrúi, ið er sosialráðgevi. Í dag arbeiða 4 fólk í trimum ársverkum. Bygnaðarliga liggja vit undir Direktoratet for

Kriminalforsorgen og danska Løgmálaráðið eins og donsku deildirnar, har ein er í hvørjum amti.

Fría kriminalforsorgin er tann partur av revsiverkinum, ið er uttanfyri fangahús.

Viðskiftafólkini verða dømd til Kriminalforsorg. Starvsøkið er allar Føroyar. Aldurin er fólk yvir 18 ár. Uppeftir er onki aldursmark. Talið av viðskiftafólkum seinastu árini sæst á mynd 1.

Tølini siga ikki beinleiðis, hvussu støðan er við revsilógarbrotum í Føroyum sum heild. Tey siga bert, hvussu mong eru dømd til Kriminalforsorgina seinastu 8 árini og slag av dómi. Í dag eru kvinnur sløk 10% árliga. Talið av fólki, ið hava framt nýggj revsilógarbrot, áðrenn eftirlitstíðin er av, hevur seinni árini ligið millum 6 og 8 %.

Fyrsta árið var húsast á Fútaskrivstovuni. Síðani hava vit leigað í Vágsbotni og í Gongini, og nú er adressa okkara Húsabrúgv 13 – ein sonn perla, ið liggur millum Havnar Kirkju og Hotel Hafnia, sum vit leiga frá Brøðrum Marstein.

Árliga játtanin (2005) er: 1.4 mió.kr. við øllum (lønir, pensiónsgjald, ferðir og rakstur). Tað er ein rár hending at farið er út um játtanina.

### Endamálið:

At fyribyrgja, at fólk, ið dømd eru fyri revsulógarbrot, gera nýggj revsulógarbrot.

Okkara egna stavnhald er, at viðskiftafólk okkara skulu vera betur fyri, tá tey fara, enn tá tey komu.

### Hvat gera tey?

Sbr Rættargangslógini § 808 skal Kriminalforsorgin gera persónkanningar viðv. sosialu og persónligu viðurskiftum teirra, ið væntast kunnu at vera dømd treytaðan dóm. Tað er vanliga Føroya Landfúti, ið biður um hesar kanningar. Endamálið er at útvega Rættinum kunning um skuldsetta, tá støða skal takast til revsiingina. Sum vegleiðing til rættin verður vanliga eisini gjørd ein niðurstøða við uppskoti um møguliga revsing og eftirlit av Kriminalforsorgini, og kanska eisini um sertreytir t.d. at fara í viðgerð móti misnýtslu av rúsdrekka/rúsevnum, at lata vatnroyndir eftir nærri áseting av Kriminalforsorgini o.a.

Persónkanningin er eisini týðningarmikil hjá Kriminalforsorgini, ið ofta hevur eftirlit (aloftast í eitt ár, men upp til 3 ár) við teimum, ið vera dømd treytaðan dóm, eins og við fólki, ið verða royndarleyslatin úr fangahúsi.

Tey, ið sita meira enn 2 mánaða fongsul, verða ofta leyslatin aftaná 2/3 tíð við ávísum treytum, um ikki tað er nakað, ið beinleiðis talar ímóti tí.

Umframt at koma við niðurstøðu og uppskoti um møguliga revsing, so er persónkanningin týðningarmesta amboð okkara til at gera eina ætlan um, hvussu framtíðin skal skipast, tá skuldsetti er dømdur. Ofta er talan um ungfólk, og stundum eru tey uttan mál og mið. Hetta erí ofta rætta løtan til at endurskoða lív sítt.

Samstundis sum vandi kann verða fyri álvarsamari revsing, so er altíð ein vón um, at ein hurð er á gloppi til eina ljósari framtíð, um tú ert fús/ur veruliga at gera nakað munagott. Útgangsstøði okkara er, at næstan alt ber til, sjálvt um tú kanska fyrst skalt inn at sita. Ert tú hugagóð/ur, gerst tú títt besta, so ganga vit langt við tær. Tað merkir, at útbúgvingarverk, almannaverk og arbeiðsmarknaður eru okkara fremsti samstarvsfelagar. Men stigið verður varliga, tí fólk okkara skulu ikki gerast sjónlig ella markast sum kriminel í almenna rúminum.

### Tey avvarandi

Foreldur ella hjúnarfelagi kanska børn venda sær til okkara. Ofta kenna tey seg rivnan og skræddan, tá tey mugu ásanna, hvat er hent – ikki minst, tá tey vara av einum álvarsamum máli, ið kanska verður viðgjørt í miðlunum. At tosa við mammur og konur, ið kanska fyri fyrstu ferð koma í eina púra ókenda verð, er natúrligur partur av arbeiðinum, eins og at vera millumlið millum danskt fangahús og heimið, tá fólk sita í útlegd. Hesi eru sera fá – í løtuni 2.

### Samfelagstænasta

Nógvar broytingar eru farnar fram seinastu árini. Heimild er t. d. at vera dømdur at gera samfelagstænastu ístaðin fyri fongsulsrevsing. Tað er í áðurnevndu persónkanning, at tað eisini verður kannað, um skuldsetti er egnaður til samfelagstænastu, og um tað er møguligt. Slagið av arbeiði, ið verður gjørt, er altíð nakað, ið ikki má vera kappingaravlagandi. Tað kann vera í sosialum arbeiði, innan ítrótt, kirkjur, samkomur, mentannarhús og hjálparfelagsskapir. Hetta er rættiliga vælumtókt aðrastaðir, men ikki hjá okkum, tí hildið verður, at so vita øll, at eg eri revsilógarbrótari. Annars vísa kanningar aðrastaðir, at fólk, ið gera samfelagstænastu, i nógv minni mun fremja nyggj revsilógarbrot, enn tey, ið fara inn at sita. Hetta hevur sjálvsagt eisini samband við, at tey, ið fáa samfelagstænastudóm ofta eru betri fyri (hava ikki framt so nógv lógarbrot) enn tey, ið fáa fongsulsdóm.

### Alkoholviðgerð

Tað er rættiliga vanligt, at partur av treytaðum dómi er orðaður á tann hátt, at dømdi skal fara í vigerð móti misnýtslu av rúsdrekka, sum áløgd verður av Kriminalforsorgini. Sjálvandi verður fyrst mett um, um tað er tørvur fyri tí. Tey fyrstu mongu árini var viðgerðin í samráð við kommunulækna, ið útskrivaði antabusheilivág, sum var umsitin av Kriminalforsorgini. Tað bar til, og tað veitti ugga og hjálp hjá nøkrum. Men munin betur hevur tað verið, eftir at vit hava fingið viðgerðarheim í landinum, har hugsjónin er verulig lívsstílsbroyting.

Tá vit nýliga frættu um nýggjan heilivág, ið tekur hugin at drekka rúsdrekka við at fáa innspræning eina ferð um mánaðin, so ljóðar tað áhugavert , um ikki hjáárin fylgja við, og um tað ikki verður ov dýrt. Tað eru so mong, ið eru forpínd og ynskja at sleppa burturúr tí, men ikki megna lívlanga dagliga strevi við at halda seg leysan av rúsdrekka.

### Rúsevni

Tað var tann tíð, tá vit kundu fegnast um, at okkara ungdómur ikki brúkti rúsevni. Men tann tíð er farin, og vit mugu ásanna, at nøkur ung bæði brúka og selja rúsevni, og at so gott sum alt slag av hesum ilgresi er tøkt í Føroyum. Fólk , ið sita fyri slík lógarbrot, hava møguleika fyri móti endanum av avsitingartíðini undir ávísum treytum at fara í rúsevnisviðgerð, um tørvur er fyri tí. Bæði fangavørar og kriminalforsorgarmeðarbeiðari gera tað tey kunnu fyri at motivera til viðgerð. Í seinastuni eru dømi um, at hin royndarleyslatni hevur sum treyt, umframt at halda seg frá rúsevnum, at lata vatn, tá Kriminalforsorgin krevur tað.

Talva 2. vísir ávís mál viðgjørd í Føroya Rætti í 1980 sammett við 2005. Álvarsom harðskapsmál eru nærum tvífaldað og mál viðv brot á lógina um euforiserandi evni eru 11-faldað. Hetta var eisini tað vit høvdu eina hugmynd um. Og tað er ein syrgilig gongd.

### Tey sálarsjúku.

Tað kemur fyri, at fólk fremja revsilógarbrot í sálarørsku. Hesi eru ikki egnað til vanliga revsing og vera tí dømd til ambulanta viðgerð á sálarsjúkrahúsi ella til innlegging, og til eftilit av Kriminalforsorgini, tá tey eru uttanfyri sjúkrahús. Nú tað finst so góður heilivágur, eru ikki stórvegis trupulleikar av hesum viðskiftafólkum . Eisini kann nevnast, at psykiatriska deild á Landssjúkrahúsinum hevur verið fyrimyndarlig í umsorganini fyri hesum viðskiftafólkum.

### Sexologisk viðgerð

Eins og í grannalondunum vóru seinast í farnu øld fleri kynslig lógarbrot framd, eisini móti børnum, her hjá okkum. Hetta slag av revsilógarbrotum hevur altíð verið í øllum londum. Tey gjørdist bara sjónligari tá. Revsingin hevur fyrr verið ymisk aftrat fongsulsrevsing t. d. kastratión og kemisk kastratión sum royndarleyslatingartreyt m.a. tí at tað hevur víst seg, at fólk (einamest menn) gevast ikki við slíkum ógerningum. Hesi 30 árini veit eg bert einstøk dømi um, at menn hava fingið kvinnulig kynshormonir sum part av revsingini. Í dag er partur av viðgerðini sexologiskar psykologsamrøður, ið verða hildnar at gera mun. Tað ber eisini til og virkar í landi okkara frá byrjan av hesi øld, tá Føroya Landsstýri hækkaði játtanina til psykologmanning á psykiatrisku Deild, so bæði hin dømdi og órættaði kundu fáa hesa neyðugu hjálp. Viðgerðin byrjar vanliga, meðan menn sita, og heldur so fram, tá teir verða royndarleyslatnir. Hetta fer fram í samstarvi millum Kriminalforsorg og Psykiatrisku Deild.

*Framhald á síðu 16*